


*Einki er at ivast í, at Kánus verður spælt kring alt landið, so skjótt sum jóladøgarðin er farin niðurum. Á myndini hava Mikkjal og Hannis tó tikið forskot upp á stuttleikan*
*Mynd: Jens Kristian Vang*

# Eitt føroyskt spæli-hitt

**Soleiðis spælir tú Kánus**
*(2-6 spælarar)*

Við byrjan hevur hvør spælarin eitt heim, har seks tómir puntar - próvteigar - eru.

Úr heiminum verður spælibrikkurin hjá einstaka spælaranum fluttur eins nógv fet, sum terningurin vísir. Eydnast at fáa terningin á ein høvuðsteig, ber til at vinna sær prógv, um svarað verður rætt upp á setta spurningin. Er brikkurin ikki á høvuðsteigi, gevur rætt svar nýggjan møguleika at ringla.

Tann spælarin, sum fyrst fyllir allar próvteigarnar við próvskivum, vinnur spælið. Eisini kunnu spælararnir gera av, at vinnarin er tann, sum megnar at fylla próvteigarnar - og sum síðani tekur høvuðsprόvtøku. T.e. at koma í miðkringin, og síðani svara tríggjar av seks spurningum á spurnarkortinum.

**Spurnarsløgini eru hesi:**

- **Uppruni** søgan hjá orðum og uppruni teirra
- **Talumál** Hvussu ymiskt verður framborið rætt í talu
- **Fak & ítriv** orð, ið knýta seg at størvum, yrkjum, vísindum v.m.
- **Fyndarorð** Tiltøk, orðatøk og fyndugar máliskur
- **Reglurætt** Hvussu ymiskt eigur at verða sagt sambært málreglum og málsligum skilvísi
- **Blandað** Spurningar, sum fella uttan fyri hini spurnarsløgini

**Hóast tað enn er langt eftir til jóla, so tykist eingin ivi vera um, at Kánus er ein stór succés-søga. Enn eru spøl eftir í handlum kring landið, men longu fýra vikur undan jólum vórðu seinastu spølini seld frá forlagnum**

**Kánus**
*Jákup Mørk*

**Føroyska málið undir jólatræið**

Soleiðis ljóðaði yvirskriftin í Sosialinum, tá ítøkiligu ætlanirnar um Kánus komu fram fyri hálvum ári síðani. Í hesum varð eisini sipað til, at hetta væl kundi gerast tann heilt stóri bestseljarin, tá tíðin var komin til jólakeypið. Nakað sum menninir handan spælið sjálvsagt eisini høvdu vónir um.

Eitt er tó at hava vónir. Nakað annað er so veruleikin, sum oftani hevur víst seg at vera væl kaldari enn heitu lyftini, sum váríð gav. Men í førinum við Kánus, so tykist tað tó, sum hevur veruligt hald verið í bjørtu lyftunum.

- Vit merktu alt fyri eitt áhuga, tá tíðindini um spælið gjørdust almenn. Og síðani hava vit soleiðis javnan fingið onkran fyrispurning. Men seinastu tíðina eru vit mest sum tiknir á bóli. Eg veit ikki, hvussu tað eitur á føroyskum – tað stendur kanska í spælinum. Men á donskum vildi tú sagt, at áhugin fyri Kánus hevur verið »overvældende«, staðfestir Hannis Egholm.

Og Mikkjal leggur afturat, at vanligi føroyingurin longu tykist hava tikið spælið til sín.

- Tað hava vit kanska sæð best hjá teimum smærru handlunum. Nógvir av hesum bíløgdu alt fyri eitt nøkur eintøk, men av ótta fyri at brenna inni við ov nógvari vøru, vóru eintøkini ikki so nógv. Ein tíðindagrein fyri stuttum broytti tó myndina. Fleiri av handlunum fingu mest sum alt fyri eitt so nógvar fyrispurningar, at fleiri eintøk vórðu bíløgd alt fyri eitt.

Og so kunnu teir mest sum róliga avdúka, at talan nærum við vissu verður um eina sera væl umtókta jólagávu. Fríggjadagin í farnu viku kundu teir báðir boða frá, at spælið var útselt frá forlagnum. Og teir sláa eisini fast, at talan verður ikki um endurprent.

– Eitt slíkt spæl kostar rættiliga nógv at prenta, og vit duga ikki at siga, hvussu nógv eintøk veruliga kunnu seljast. Bæði Kánus og Landastrok hava selt øll eintøkini, men hvar liggur ovara markið í einum somikið lítlum landi, sum Føroyar eru? Eru tað 5.000 ella 6.000. Ella kanska meira? Vit kunnu jú enda í teirri støðu, at allur vinningurin verður etin upp av einum lagri av endurprenti, og tað er so ikki ætlanin.

*Í líknandi spølum hevur tú sæð, at nýggir spurningar verða sendir á marknaðin, hóast spælið ikki er endurprentað. Er tað nakað, sum tit hava hugsað um?*

- Nei - og tað eru tað tvinnar orsøkir til. Onnur er, at spurnarparturin er so nógv tann dýrasti parturin av prentinum. Og tí vildu nýggir spurningar kostað keyparanum næstan eins nógv, sum alt spælið. Og hartil, so er eisini avmarkað, hvussu nógvar spurningar tú kanst gera, tá evnið er so væl definerað.

**»Føroyskt« er lyklaorðið**

Skal ein vøra gerast ein góð succes, er aloftast neyðugt, at nakað er, sum fangar keyparan. At hesin alt fyri eitt sær, hví hetta er nakað júst fyri seg. Hvat er tað, sum ger, at júst hetta spælið er nakað, sum fólk eftir øllum at døma hava tikið til sín.

– Fyrst og fremst, so halda vit, at tað er sera týdningarmikið, at spælið er føroyskt burturav. Og at tað onkursvegna snýr seg um føroysk viðurskifti. Tað vildi jú ikki nyttað nakað serligt, um vit gjørdu eitt Ludo á føroyskum, halda teir báðir mest sum í einum. Og sjálvandi skal tað eisini vera stuttligt. Tað er stuttleikin, sum fær teg at royna spælið fyrstu ferð. Megnar tú so eisini at gera tað læruríkt, so